# Føroyska fólkasá

**Við bókini *Færøblues* gevur høvundurin Lisbeth Nebelong eitt boð uppá, hvussu tað kennist at vera føroyingur, fangaður millum tað gamla og tað nýggja, og í samanstoytinum millum føroyska og danska mentan**



## Bókaprát



**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

"Det er sjovt med dig, Kári, sagde hun. – Faktisk tænker jeg slet ikke på dig som færing"

Tá orðini hjá ríkisumboðsfrúnni fella í seinnu helvt av skaldsøguni *Færøblues*, er tað ikki bara høvuðspersónurin, 16 ára gamli Kári, ið hveppur seg við. Eisini lesarin veit, at annað og meir enn bara samleikin hjá Kára er uppi til kjak í hesum brotinum í nýggju skaldsøguni eftir Lisbeth Nebelong.

Hvat vil tað í grundini siga at vera føroyingur? Ella enn truplari: Hvat vil tað siga at vera føroyingur, tá stóri parturin av søguliga viðførinum á onkran hátt er danskur?

### "Typiskt danskt"

Meðan svarið flytur seg millum bókasíðurnar, fær ein hug at halda tað vera dekan ov næsadjarvt av eini donskum kvinnuligum rithøvunda at billa sær inn, at hon veit, hvussu tað var at vera ein 16 ára gamal havnadrongur í 60 unum. Tíansheldur hvussu tað er, at vera føroyingur.

Lisbeth Nebelong smílist, meðan hon ristir við høvdinum.

- Nei, eg billi mær als ikki inn, at eg veit, hvat tað vil siga at vera føroyingur. Mín uppgáva sum rithøvundur er at *ímynda* mær tað og síðani lata tað til høvuðspersónin, Kára, at fortelja, hvussu tað kennist. Í *Færøblues* eri eg ein eyðgleiðari á kanningarferð í hesum serliga føroyska/danska universinum, sum altíð hevur hugtikið meg – og sum eg í ávísan mun kenni meg aftur í, sigur Lisbeth Nebelong og sipar til, at hon sjálv hevur búð í Føroyum í fleiri umførum.

Í bókini koma mentanarligu samanstoytirnir einamest til sjóndar í vinarlagnum millum Kára og Erik, sonur danska ríkisumboðsmannin. Men Erik hevur eisini ein annan týðandi leiklut. Høvundurin er nevniliga rættiliga sannførd um, at tað er, tá vit hitta fólk frá øðrum mentanum, at vit síggja okkum sjálvi í einum klárari ljósi. Um vit also eru opin fyri tí.

Hendan møguleikan fær Kári í ríkiligt mát í vinarlagnum við Erik, sum er hamrandi troyttur av "undirlutakensladum" føroyingum, ið allir sum ein langt síðani høvdu verið deyðir, um øvundsjúka var ein deyðilig sjúka.

Men er slíkt ein "sannleiki", Kári ella aðrir føroyingar kunnu brúka til nakað?

- Tað má vera upp til lesaran at meta um. Sjálv haldi eg, at tað sigur meir um Erik, enn nakran annan, at hann gongur og fýrir sovorði av. Tað er jú ikki, tí hann er óndur, men hansara situatiónsfatan sum danskari í Føroyum er onki at reypa av, sigur Lisbeth Nebelong.

Og tað veit Kári eisini. Skjótt lærir hann at geva aftur av somu skuffu og letur Erik vita, at hann er deyðatroyttur av "typiskum" danskarum, sum koma dragandi til Føroyar við teirra normum og virðum, uttan at geva sær far um landið, teir eru komnir til.

### Møguleika at velja

Orðadráttir, sum hesir, gera ofta *Færøblues* rættiliga stuttliga at lesa, men tað er ikki bara fyri teirra undirhaldsvirði, at teir hava fingið pláss í bókini.

Sambært Lisbeth Nebelong er hetta ein roynd at vísa, hvussu tápulig og útlitaleys, hendan uppbýtingin í danir og føroyingar, "okkum" og "tykkum" í grundini er. Um vit ikki læra at hevja okkum upp hendan bólkahugburðin, kann onki konstruktivt spyrjast burturúr mentanarliga sambandinum millum Føroyar og Danmark. Og tað er stórt spell, heldur hon.

Sjálv heldur hon tað ikki vera bláoygt at trúgva, at okkurt slag av sameining millum mentaninar kann fara fram, hóast Føroyar ikki er ein sjálvstøðug tjóð.

- *Færøblues* er fyrst og fremst ein lýsing av sambandinum millum menniskju. Erik og Kári kunnu velja, um teir síggja hvønn annan sum "danskari" og "føroyingur" við øllum teimum eintáttaðu og avmarkandi hjátýdningunum, tað hevur við sær. Ella teir kunnu velja at síggja hvønn annan sum persónarnir Erik og Kári, sum jú eru so nógv annað eisini, sigur Lisbeth Nebelong.

Eftir hennara tykki er tað sostatt í stóran mun upp til menniskju sjálvi, um tey lata seg stýra og avmarka av ytru umstøðum,

### Færøblues

Bókin snýr seg um Kára, sum veksur upp í Havn í seksti- og sjeytiárunum. 19 ára gamal fer Kári til Norra at útbúgva seg til selloleikara, og vitjar hann ikki aftur í Føroyum fyrr enn 25 ár seinni, tá hann skal spæla á eini konsert í Norðurlandahúsinum.

Vitjanin í Føroyum fær minnini um dreingjaárini í Havn at skola inn yvir Kára: minnini um kærleikan til donsku Lisu og vinarlagið við beiggja hennara Erik; tónleikaspælið saman við pápabeiggjanum Árna, heitu ástarløturnar saman við italsku Novella; túrin til skips við Bjørtu og ikki minst pínufullu uppgerðina við mammuna.

Myndaliga verður royndin hjá Kára at finna sítt pláss í lívinum samstundis ein lýsing av tvídráttinum millum føroyska og danska mentan og av lívinum í Føroyum millum siðvenju og modernitet.

Færøblues er onnur bókin í ætlaða tríverkinum hjá Lisbeth Nebelong um føroyska-danska mentanarsambandið.

Fyrsta bókin hevur heitið *Når engle spiller Mozart*, og kom hon út í 2003




Sosialurin